

*Nakrir av amerikansku tónleikarunum løgdu í gjár leiðina fram við í Miðlahúsinum – leygarkvøldið fara teir á pallin saman við føroyskum sangarum, sum hava tikið tónleik upp í Nashville*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Vinarlagið lokkaði teir til Føroya

**Vanliga skal eitt Grammy-tiltak ella okkurt heilt óvanligt fyri at savna teir, men nú eru sjey super-tónleikarar komnir til Føroya at spæla til útselda konsert saman við føroyskum sangarum**

NASHVILLE
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað er kanska eitt sindur av muni á Lisu Frederiksberg og Dolly Parton - ella Magna Christiansen og Willie Nelson. Men munurin er ikki størri enn so, at hesir sangarar brúka nakrar av somu tónleikarum.

Í gjár komu sjey super-tónleikarar úr Nashville til Føroya. Teir eru vanir við at spæla saman við stórum amerikonskum stjørnumí studio ella til stórar konsertir, men leygarkvøldið skulu teir spæla undir hjá føroyskum solistum, sum hava verið í Nashville í USA og tikið tónleik upp seinastu árini.

Og tað er í grundini eitt bragd at savna hesar tónleikarar í Føroyum, tí vanliga spæla teir bert saman til Grammy-tiltøk ella onnur serlig tiltøk í USA.

- Vinarlagið við føroyingar hevur lokkað okkum til Føroya. Vit eru spentir at sleppa at uppliva eitt so fjarskotið land sum Føroyum, sum vit hava hoyrt so nógv gott um, sigur John Hobs, sum er ein av teimum dugnaligu tónleikarunum.

Og tá ið august er ein rímiliga friðarlig konserttíð í USA, ber til hjá tónleikarunum at flúgva tvørtur um Atlantshavið.

## Vanir við nógvar solistar

John Hobs hevur roynt mangt og hvat sum tónleikari og orkesturleiðari. Eitt nú skipaði hann fyri tónleikinum, tá Willie Nelson helt sína 70 ára føðingardagskonsert, og í løtuni er hann orkesturleiðari hjá countrysangaranum Vince Gill.

- At koma til Føroya at spæla á einari slíkari konsert er nakað heilt annað enn at sita í studio í Nashville og spæla. Vit eru komnir hendan vegin, tí vilja uppliva nakað øðrvísi, sigur John Hobs.

Hann er vanur við at spæla til konsertir, at nógvir solistar eru á pallinum, og tí renna dugnaligu amerikansku tónleikararnir seg ikki í trupulleikar, tá teir mongu føroysku solistarnir skulu syngja saman við teimum leygarkvøldið.

Áhugin fyri Nashville-konsertini leygarkvøldið hevur verið so stórur, at konsertin er útseld. Í løtuni verður tosað um at gera eina eykakonsert, men tað er ikki komið upp á pláss.

# 100 springarar løgdu beinini

**Fyrrapartin leygardagin løgdu 100 springarar beinini í Øravík**

SPRINGARAR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin boðaði Smyril frá, at springarar vóru á Trongisvágsfirði. Bátar fóru beinanvegin út, og um 9:30 tíðina vóru springararnir hildnir til.

Eini 100 springarar løgdi beinini í Øravík. Seðlarnir komu út klokkan 15. Býtt varð til Froðbiar Sókn.



*Eini 100 springarar løgdi beinini í Øravík*

*Mynd: DS*

Nú er tryggari at vera brúkari í Føroyum.



MÓTTØKA

Í sambandi við at Brúkaraumboðið er farið at virka, verður móttøka í Vági

**fríggjadagin 4. september kl. 15.30-17.30**

Andrass Holm Arge, brúkaraumboðsmaður, bjóðar vælkomin og greiðir frá virkseminum hjá stovninum, og Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, leggur nýggju heimasíðuna bruk.fo út. Eisini verður ábit og tónleikur.

**Smyril fer av Havnini kl. 13.00 og fer av Tvøroyri aftur kl. 21.00**

BRUK.FO
BRÚKARAUMBOÐIÐ

Vágsvegur 22
Postsmoga 80
FO-910 Vágur
Tel. +298 35 80 00
Fax +298 35 80 01
www.bruk.fo

Brúkaraumboðið er stovnur undir Vinnumálaráðnum og skal hava eftirlit við marknaðarføringslógini og fremja góðan marknaðarføringssið.

SENDISTOVAN